# Deyði og einsemi

A. GUTTORMUR DJURHUUS



Á veg út av sjúkrahúsinum, møtti eg vinmanni í durinum. “Góðan dag! Tú hevur eisini verið á vitjan”, heilsaði eg. “Jú, jú, N. N. liggur inni á deildini hægri uppi og stríðist. Hann hevur tað ikki so gott”. “Eg átti at hugt inn til hansara. Vit kennast”, helt eg fyri. “Ja vælsignaður, ger tað. Hann fær helst ikki ov nógvar vitjanir”.

Eg fór nakrar hæddir upp, og inn á deildina. Har sat ein sjúkrasystir í einum búri. Eg fór yvir til hennara. Hon var umgird av elektroniskum tólum. Tað sá fløkjasligt út. Ikki hvørs mans føri at halda skil á øllum tí dáta, sum har varð savnað og skrásett. Hópin av neyvum dáta. Eisini løtan har einki meir var at skráseta. Eg segði míni ørindi. Um tað var gjørligt at vitja N. N.. “Tað er einki til hindurs fyri tí”, segði hon fryntliga. “Hann liggur á stovu x. Tað er bara at fara inn”.

Hóast eingin svaraði, tá eg bankaði á hurðina, fór eg innar. Har lá hann. Hann hugdi fram fyri seg, men ikki veit eg um hann sá nakað, ella um hann hevði nakað samband við umheimin ella ikki. Aftan fyri ein skerm lá annað fólk, sum helst eisini var deyðkomið. Kalt var á stovuni. Vindeygað var opið. Helst fyri at halda byrjandi líkroykinum burtur. Hóast tað kendist hann strammur í næsunum. Eg tók í hondina á honum. Hon kendist køld og følnað. Tosaði fyri meg sjálvan, meðan eg sat har og hugsaði um lívsins fáfongd. Helst var ikki annar áhoyrari enn eg sjálvur, men tað gjørdi minni. Hann skalv illa. Tað hann hevði oman á sær, sá ikki út at kunna geva tann fløva, sum kroppinum tørvaði. Sjúkrasystirin, sum hevði sitið vakt yvir elektronisku tólunum, hugdi inn á stovuna. “Eg skilji ikki at hann skelvur so illa”, segði hon. “Kanska er tað tí at hann er kaldur”, helt eg fyri. Kroppurin maktaði ikki longur at fáa til vega tann hita, ið honum tørvaði at halda seg heitan. Tá eg skuldi fara, vildi hann illa sleppa hondini. Helt hann meg vera bindilið til lívið? Ella var tað bert ein lítil troyst í einseminum?

Einsamallur var hann í lívinum. Heima hjá honum savnaðust eingi vinfólk. Og sjálvur leitaði hann sær ikki til onnur at vera saman við. Nú skuldi hann møta deyðanum. Púra einsamallur. Festur í nakrar gevarar, sum boðaðu einum elektroniskum tóli frá støðuni. Sjúkrasystirin kundi so lesa av um hann framvegis var millum tey livandi, ella um hann var farin. Ella varð alt skrásett við einum sjálvvirkandi skrivara? Um hann hevði havt vinfólk, høvdu tey kanska tímað at sitið við seingina og kundi tað veitt nakað av ugga. Men har var eingin. Heldur einki ættarfólk.

Fyrr var á sjúkrahúsum vakt uppi yvir fólki, sum lógu á deyðastrá. Helst vóru tað eldri sjúkrasystrar, sum vaktu. So er ikki longur. Tað er ov dýrt, siga samfelagsfyriskiparararnir. Vit hava ikki ráð.

Uttan fyri vesturafrikanska landið Guinea-Bissau liggur oyggjabólkurin Bijagosoyggjarnar. Fyrisitingin í høvuðsstaðnum Bissau røkkur ikki út í oyggjarnar, og skipar fólkið, ið har býr, síni egnu viðurskifti. Helst er tað einasta samfelag í heiminum, har kvinnur enn ráða fyri borgum. Gandalæknin var tó ein maður. Á einum av mínum ferðum til Bijagos hitti eg hann á máli. Hann búði beint uttan fyri bygdina Bubaque, undir einum heilagum træi. Ikki var hann bert lækni, men eisini var hann semingsmaður og dómari. Brotsligheitin var lág. Tó hendi onkuntíð okkurt álvarsamt brot. Tá varð tann, sum brotið hevði framt, dømdur til avbyrging frá samfelagnum. Spurdur hvat hendi við teimum, sum koyrd vórðu út úr samfelagnum, svaraði hann, at tey hvurvu. Meira fekst hann ikki at siga. Ella visti hann tað ikki. Tað er væl kent millum mannfrøðingar og andamanarar, at væl ber til at taka lívið av fólki við orðum. Tey, sum fingu dómin at verða koyrd úr samfelagnum, blivu ikki bert burtur - tey doyðu eftir stuttari tíð.

Men tað eru fólk, sum av fríum vilja søkja einsemi. Einbúgvar. Hvussu við teimum? Tey eru ikki einsamøll. Full av trúgv og tonkum.

Flestu okkara vilja hava eitt menniskja undir liðini á okkum, tá vit skulu hiðani. Um vakt sat hjá fólki, har deyðin var væntandi, høvdu tey helst livað longur. Og onkur hevði kanska komið fyri seg aftur. Um onkur sat við songarstokkin, hevði deyðin verið virðiligari og lættari at góðtikið hjá tí doyggjandi.

Fáar dagar eftir at eg hevði vitjað N. N., doyði hann. Ikki var líkfylgið stórt, sum fylgdi honum til gravar.

Myndirnar eru úr bókini »S. Joensen-Mikines« eftir Ernst Mentze, 1973



*Sorg, 1937*



*Fyri deyðanum, 1940*



*Gravarferðin, 1950*